# tina í sálmunum

## Ein kirkja úr 7777 steinum

Á fundi í kirkjuráðnum fyri Kirkjubøar sókn í 1908 viðmælir ráðið einum ynski frá bygdarfólkinum í Hesti um at fáa nýggja kirkju. Hetta fæst at vita úr fundarbókini, og helst er farið í holt við arbeiðið beinanvegin, tí longu tvey ár seinni - í 1910 - er kirkjan liðug.

Til formann fyri grótarbeiðinum valdu hestmenn Rasmus Lemvig. Sum formaður varð hann løntur av kirkjugrunninum, men avgjørt varð millum hann og bygdarmenninar, at lønin skuldi falla til kirkjuna. Fyri henda pening varð ljósakrúna keypt. Annars var alt annað arbeiði sjálvboðið.

Magnus Jacobsen arkitektur í Havn - vanliga nevndur Magnus á Kamarinum - hevur teknað kirkjuna. Kirkjan, sum er bygd dygst við bakkatrom, norðan fyri Kvíggjará, og er laðað av gróti uttan og klødd við timbri innan, og er máld uttan 12x24 alin.

7777 steinum sigst hon at vera laðað av. Laðingin sæst tó ikki, tí kirkjan er pussað uttan. Uttan er kirkjan hvítmálað við svartari grund og hevur reytt asbesttak. Tornið er hvítt og reytt.

Kirkjan varð vígd 2. hvítusunnudag (5. juni) 1911 av Fríðrikki Petersen, prósti.

*(Kelda: J. P. Gregoriussen: Yngru Hválvkirkjurnar)*

” *“ Vit mugu ansa eftir, at tað ikki bara verður so at sálmurin skal verða liðugur so skjótt sum gjørligt. Annars kann ein missa andaktina í sanginum!*

skifta út við eina aðra.

Jørmundur hevði onkutíð borið uppá mál heima við hús, at tað hevði verið stuttligt at havt eina urgu í húsinum. Tá so ein lýsing av Strondum um eina slíka urgu kom í bløðini var pápin skjótur at ringja inn hagar.

– Hann kom aftur og segði mær, at nú hevði hann keypt urguna. Og hann hevði keypt hana uttan at hann yvirhøvur hevði sæð hana ella hoyrt, hvussu hon ljóðaði!

– Hon varð bara keypt umvegis telefonina, sigur hann brosandi.

Pápin mundi tó vitað, hvat hann gjørdi. Urgan varð nevniliga keypt frá sjálvum Christiani Høj, skúlastjóra á Strondum, og hann metti tí at hesin maðurin mátti vera álítandi.

Teir gjørdu skjótt av: Fóru í bátin og løgdu leiðina inn á Strendur, hagani urgan varð flutt út aftur í Hest.

– Vit royndu hana áðrenn, og sóu at hon var í góðum standi!

Í summum heimum var fýrur mangan ein plága, men tá teir kannaðu urguna fyri tað, var eingin fýrur at síggja.

– Jú, hon var góð. Eg haldi eisini, at hesar traðkiurgurnar eru betri enn tær elektrisku, sigur Jørmundur,

### Syngja ov týtt

Hvønn einasta sunnudag hevur útvarpið eina beinleiðis sending við upptøku frá onkrari gudstænastu kring landið.

Hetta er til stóra gleði hjá teimum, sum av einihvørjari orsøk eru forðað at sleppa til gudstænastu. Hesi lurta trúfast eftir útvarpsgudstænastunum.

Tey, ið dáma væl sálmasang leggja helst til merkis, at orðini í sálmunum eru tey somu, men at tempo'ið kann vera so ymiskt frá kirkju til kirkju, frá urguleikara til urguleikara.

Sjálvur roynir Jørmundur at halda eitt javnt og gott tempo, hóast hetta ikki altíð er so einfalt, tí kirkjufólkið ikki er so nógv í tali.

Hann minnist ein eldri mann úr Skopun, sum plagdi at sita á loftinum. Hann sang so skjótt, at tað vóru ikki øll sum dámdu hetta so væl.

– Eg haldi tó, at í Christianskirkjuni í Klaksvík syngja tey sera væl. Mær dámar sera væl at hoyra tey syngja – hóast tað kanska onkutíð er í heldur skjótari lagi.

– Vit mugu ansa eftir, at tað ikki bara verður so at sálmurin skal verða liðugur so skjótt sum gjørligt. Annars kann ein missa andaktina í sanginum, slær Jørmundur fast.

Tá sjónvarpið vísir gudstænastur sunnudag roynir Jørmund at hyggja eftir hvør spælir. Men tað er ikki altíð so lætt at vita, hvør tað er, tí ein sær bara nakkan á urguleikaranum.

– Tað hevði verið gott um teir kundu víst hvør spældi til gudstænastuna, ljóðar áheitan hansara.

### Tobbi og Hests kirkja

Jørmundur minnist eina sending í útvarpsrásini Lindini, har Jenis av Rana hevði vitjan av tingmanninum Torbjørn Jacobsen. Her tosaðu teir um mong ymisk viðurskifti, m.a. um tónleik og sang.

Í sendingini nevndi Tobbi, at honum dámdi væl tónleik og at hann eisini plagdi at lurta eftir gudstænastunum í útvarpinum.

– Hann segði seg hava hoyrt eina gudstænastu úr Hesti í útvarpinum. Her segði hann, at urguleikarin spældi soleiðis sum fólkið sang.

– Eg veit ikki rættiliga, hvat hann meinti við. Kanska helt hann tað vera ov saktað, men onnur halda tað vera í fínasta lagi. Soleiðis er!



*Tey gomlu løgini eru góð, men nógv av teimum nýggju eru eisini góð. – Men tað er líkasum at fólki dámar best at syngja tey góðu gomlu løgini, sigur Jørmundur*